2021







# Vel tína yrkisleið

## Føroyskar yrkisútbúgvingar til tína framtíð



*Vegleiðingarstovan heldur til á Hoydalsvegi 1, 100 Tórshavn, telefon 200910, vegleiding@uvs.fo, www.vegleiding.fo*

**Vegleiðingarstovan** Ætlar tú á miðnámsskúla, ella hevur tú spurningar um útbúgvingarmøguleikar, arbeiðsviðurskifti ella stuðulsmøguleikar, so kunnu vit hjálpa tær. Tú ert vælkomin at støkka inn á gólvið hjá okkum, tær nýtist ikki at bíleggja tíð frammanundan. Tú ert eisini vælkomin at ringja ella skriva til okkara.

Vegleiðingarstovan veitir øllum borgarum í Føroyum dygdargóða vegleiðing um útbúgvingar- og yrkismøguleikar. Endamálið er at hjálpa fólki í øllum aldri at menna seg útbúgvingarliga ella starvsliga uttan mun til, hvørjar fortreytirnar eru.

**Skúla- og lestrarvegleiðing** Á øllum fólkaskúlum og miðnámsskúlum eru skúla- og lestrarvegleiðarar, sum m.a. hava til uppgávu at kunna komandi og verandi næmingar um ymisku lestrarmøguleikarnar. Skúla- og lestrarvegleiðarar hava kunnleika til ymisku útbúgvingarnar og hava tilfar, ið kann vera hent hjá næmingunum at kunna seg við. Á heimasíðunum hjá einstøku skúlunum ber til at finna upplýsingar um vegleiðingina.

## Umsóknarfreist og treytir

Freistin at søkja inn á Yrkisnám í ár er 15. mars 2021.

Fyri at kunna søkja, skalt tú í minsta lagi hava fylgt undirvísingini í fólkaskúlanum og 9. flokki, ella hava samsvarandi kunnleikastøði.

Talgilt umsóknarblað er at finna á **innskriving.fo**

Skúlarnir, sum bjóða útbúgvingar innan Yrkisnám, eru:

- ✓ **TSK** • www.tsk.fo
- ✓ **Glasir** • www.glasir.fo
- ✓ **Miðnámsskúlin í Suðuroy** • www.midnam.fo
- ✓ **Miðnám á Kambsdali** • www.kambsdalur.fo
- ✓ **Heilsuskúli Føroya** • www.heilsuskulin.fo



# Yrkisleiðin – eitt trygt val!

**Góðir møguleikar eru at velja eina yrkisútbúgving í Føroyum.**

**Tekniskt Yrkisnám er grundarlag undir nýggjum møguleikum hjá teimum, ið velja eina lærlingaútbúgving ella aðra yrkisútbúgving, og møguleikarnir við einari útbúgving innan fyrisiting, skrivstovu og handil eru framtíðartryggjaðir.**

**Sama er galdandi fyri útbúgvingarnar á Heilsuskúla Føroya, har tú kanst útbúgva teg til heilsuhjálpara, heilsurøktara ella námsfrøðihjálpara.**

# Tekniskt Yrkisnám

## Yrkisútbúgvingarnar, sum teknisku skúlarnir bjóða, eru skipaðar undir heitinum Tekniskt Yrkisnám, og tær fevna um:

- ✓ **Timbur** (Glasir og TSK)
- ✓ **EL** (Glasir og TSK)
- ✓ **Bilsmið** (Glasir)
- ✓ **Metal** (Glasir og TSK)
- ✓ **Hárfríðkan** (Glasir)
- ✓ **Klædnaatstøði** (Glasir)
- ✓ **Tilvirkisatstøði** (Glasir)
- ✓ **Matvøruatstøði** (TSK)

Ert tú í læru og hevur lærusáttmála, tá fevnir skúlagongdin á Tekniskum Yrkisnámi um 50-55 vikur. Hevur tú ikki lærusáttmála kanst tú taka Tekniskt Yrkisnám eftir einum ári.

Á Tekniskum Yrkisnámi hevur tú tveir valmøguleikar at byrja tína yrkisleið. Teir eru við lærusáttmála við fyritøku, ella við ongum lærusáttmála

## Við lærusáttmála

Hevur tú gjørt sáttmála við eitt lærupláss, verður skúlagongdin hjá tær løgd til rættis saman við læruplássinum, soleiðis at tú ert í verkligu læruni ímillum tey ymisku skúlaskeiðini.

Ein yrkisútbúgving varir vanliga í umleið 4 ár. Av hesum eru vanliga 55 vikur í skúla. Hetta er galdandi, um tú hevur lærusáttmála.

Við lærusáttmála tekur tú øll skúlaskeiðini í Yrkisnámi. Ímillum skúlaskeiðini hevur tú verkliga læru.

1. og 2. skúlaskeið eru 20 vikur hvørt. Tá hevur tú yrkislærugreinar og almennar lærugreinar á E stigi.

Í 3. skúlaskeiði, sum fevnir um 10 vikur, hevur tú bert yrkislærugreinar at hugsa um, og tú sleppur at førleikamenna teg í tínum yrki burturav og miðvíst.

Eftir 3. skúlaskeið verður farið til sveinaroynd, og tú fært sveinabræv í tínum yrki.

## Við ongum lærusáttmála

Ætlar tú at læra til elektrikara, hárfríðkara, timburmann, metalsmið ella bilsmið, og ikki hevur lærusáttmála, kanst tú søkja um upptøku á øðrum av yrkisskúlunum (annahvørt á Glasi ella á TSK) til 1. skúlaskeið, har tín yrkisgrein verður boðin út. Har byrjar tú skúlagongdina í 1. skúlaskeiði, sum er 20 vikur. Um tú stendur 1. skúlaskeið, er møguleiki at fara beinleiðis inn á 2. skúlaskeið innan økið.

# Timbur, el og bil

**Útbúgvingarnar í Tekniskum yrkisnámi taka vanliga fýra ár. Tú fært lærlingaløn í útbúgvingartíðini.**

## Timburmaður

Ein timburmaður fæst í høvuðsheitum við at smíða hús. Talan kann vera um sethús, aðrar bygningar og onnur byggiarbeiði. Arbeiðsuppgávan hjá einum timburmanni kann fevna um at forskalla, leggja gólv, smíða útveggir og takverk. Eisini arbeiðir ein timburmaður við at bjálva, klæða, seta vindeygu og hurðar í, at seta køkar upp, umframt aðrar bygningspartar.

Í lærutíðini verður skift ímillum verkliga læru á góðkendum læruplássi umframt skúlagongd á yrkisskúla. At enda verður sveinaroynd gjørd.

Skúlagongdin í sambandi við timburlæru kann fara fram í Havn ella í Klaksvík.

Tá ið tú ert liðug/ur við útbúgvingina kanst tú arbeiða sum timburmaður ella fara undir framhaldslesnað, eitt nú til byggiteknikara/byggifrøðing ella arkitekt.

## Snikkari

Ein snikkari arbeiðir serliga við træ og ger hurðar, vindeygu og innbúgv. Á skúlanum lærir tú at arbeiða við maskinum og amboðum. Harafturat lærir tú um ymiskt tilfar, ið skal brúkast.

Tú kanst enda tína útbúgving við ymiskum sergreinum í mun til tíni áhugamál og títt lærupláss. Tú kanst gerast snikkari og framleiða hurðar og vindeygu, innbúgv, arbeiða sum bygningsmontørur ella hava sergrein sum bygningssnikkari, møbilsnikkari ella orgulbyggjari.

Sum útlærdur snikkari kanst tú taka víðari útbúgving sum t.d. byggitøkningur, designtøkningur, orkutøkningur, kort- og landmátaratøkningur, framleiðslutøkningur, byggifrøðingur og professiónsbachelorur í útflutningi og tøkni.



## Elektrikari

Ein elektrikari fæst við at leggja sterk- og veikstreym inn í t.d. sethús, skrivstovur, virkir, skúlar og umborð á skipum. Hetta fevnir m.a. um ljós, motorar, elektroniskar stýringar til flutningsskipanir og framleiðslueindir.



Harumframt fæst elektrikarin við tele-, teldu- og antennuinnleggingar, og at ráðgeva kundum í at velja elektriskar loysnir.

Í lærutíðini verður skift ímillum verkliga læru á góðkendum læruplássi umframt skúlagongd á yrkisskúla. At enda verður sveinaroynd gjørd.

Skúlagongdin kann fara fram á Glasir í Havn ella á Tekniska Skúla í Klaksvík.

Sum elektrikari kanst tú eisini fara undir eina framhaldsútbúgving sum t.d. KT- og elektronikktøkningur, framleiðslutøkningur, sterkstreymstøkningur, byggitøkningur ella verkfrøðingur, har neyðugt er við ávísum ískoytislærugreinum.

## Bilsmiður

Sum bilsmiðslærlingur lærir tú m.a. um skrokk, stýrigreiðir, bremsur og girskipan, bensin- og dieselmotorar og motorstýringar. Tú lærir um tey elektronisku hjálpartólini: tól at kanna bremsur, útlát, hjólsporing, elektriskar skipanir, stýringar v.m.

Somuleiðis lærir tú um mekaniskt og elektroniskt arbeiði á persónbilar, vørubilar og partvíst lastbilar.

Í lærutíðini verður skift ímillum verkliga læru á góðkendum læruplássi umframt skúlagongd á yrkisskúla. At enda verður sveinaroynd gjørd. Skúlagongdin kann fara fram á Glasir í Havn.

Sum útbúgvin bilsmiður kanst tú eisini fara undir eina framhaldsútbúgving sum t.d. maskinmeistari, maskintøkningur ella verkfrøðingur, sum tó krevur ávísar ískoytislærugreinar.

# Metalsmiður

**Útbúgvingarnar innan metalsmíð eru fleiri. Vit kunnu nevna maskinsmiður, kleinsmiður, rustfastur kleinsmiður, rør- og blikksmiður, rørsmiður og sveisari.**

## Maskinsmiður

Sum maskinsmiður arbeiðir tú við stýringstekniskum skipanum og maskinum. Í útbúgvingini lærir tú at byggja upp,

forrita, finna brek og at umvæla einfaldar stýringstekniskar skipanir, tú lærir at velja røtt amboð og rætt dátugrundarlag í sambandi við framleiðsluuppgávur.

Eisini lærir tú um framleiðslutilgongdir og at viðlíkahalda og montera høvuðspartarnar av einum motori, at gera minni konstruktiónir av plátu, røri og stálprofilum, og einfaldar viðlíkahaldsuppgávur av eitt nú rørskipanum, pumpum og ventilum.

## Kleinsmiður – plátu- og konstruktiónssmiður

Í útbúgvingini lærir tú um ymisk sløg av metalli, og hvussu tað kann formast. Ein týðandi partur av arbeiðinum er at velja rætt tilfar og rættan arbeiðshátt til tær ymisku uppgávurnar. Tú fært grundleggjandi vitan um at viðgera metal. Tú lærir at gera tilskeringar í plátur og rør, at montera lutir, maskinur og installatiónir og at viðlíkahalda framleiðslutól. Harumframt lærir tú at yvirflatu- og eftirviðgera metal og annað tilfar.

## Rustfastur kleinsmiður

Sum rustfastur kleinsmiður lærir tú at gera samansetingar av forgreiningum og bukkingum í rørum í rustføstum stáli, og at velja egnaðar eftirviðgerðir og fremja yvirflatu- og eftirviðgerð av rustføstum stáltilfari.

## Rør- og blikksmiður

Rør- og blikksmiðurin arbeiðir við nýgerð og røkt av vatn-, hita-, gass og ventilatiónsinnleggingum í sethúsum og virkjum. Tú lærir at seta upp hvs-stýriskipanir, oljuketlar og varandi orkuinstallatiónir, umframt at veita kundavegleiðing.

Tú lærir eisini at gera tunnplátusamankomingar við sveising úr aluminium, stáli og rustføstum tilfari, at lodda, nitta og falsa.

Sum rør- og blikksmiður lærir tú at leggja til rættis og gera minni skap í plátu-, rør- og stálprofilum, og at gera inndekningar og kappabjálving.

## Rørsmiður

Rørsmiðurin arbeiðir við nýgerð og røkt av installatiónsarbeiði í sethúsum, verksmiðjum og virkjum. Tú lærir at seta upp hvs-stýringsskipanir, oljuketlar og varandi orkuinstallatiónir, og at veita kundavegleiðing.

Eisini lærir tú at gera samankomingar, tilskeringar og evna til skurð í plátum og rørum.

Sum rørsmiður lærir tú at leggja til rættis og gera minni skap í plátu-, rør og stálprofilum.

## Sveisari

Sveisari arbeiðir við sveising, tilskering og framleiðsluuppgávum innan metaløkið. Tú lærir at evna til skurðir í plátur og rør og at velja rætta tilfarið, og hvussu tað skal eftirviðgerast.

Eisini verður arbeitt við at viðlíkahalda amboð og maskinur og at yvirflatu- og eftirviðgera metal og annað tilfar, umframt at leggja til rættis samansettar sveisiuppgávur.

Sveisari lærir í 2 ár og 6 mánaðir. Skúlagongdin er 35 vikur.

**Felags fyri útbúgvingarnar innan metalsmíð er, at tær geva førleika at fara undir víðari lesnað, m.a. sum maskinmeistari, framleiðslutøkningur og verkfrøðingur. Undantikin er sveisarin.**





# Skapandi yrkisgreinar og atstøðiútbúgvingar

## Hárfríðkan

Hárfríðkarar fáast mest við hárviðgerð, men næmingarnir læra eisini alt um vakurleikarøkt, og hvat tað ber í sær, at reka eitt virki, so sum búskap, kundarøkt, sálarfrøði og mangt annað. Arbeiðið er fjølbroytt, tí mótin skiftir rættiliga ofta.

Hárfríðkarar starvast mest á hárfríðkanarstovum, tó eisini í sjónleikarahúsum, í sjónvarpi o.tíl.

Sum útlærd/ur innan hárfríðkanaryrkið hevur tú møguleika at útbúgva teg víðari sum stylistur, kosmetikari, kosmetologur, make-up artistur, manicuristur o.a.

## Klædnaatstøði

Klædnaatstøði er ein 2 ára grundútbúgving, har tú av sonnum fært høvi at royna tíni skapandi evnir innan mótaverðina. Útbúgvingin er spennandi og kreativ, og tú fært hollan kunnleika innan klædnaframleiðslu. Arbeitt verður við sniðgeving, seyming, konstruktión og mótasøgu. Útbúgvingin verður boðin fram á Glasi í Havn.

Sum útbúgvin klædnaatstøðingur hevur tú møguleika at lesa víðari til sniðgeva, klædnahandverkara, ella tú kanst velja at arbeiða á seymistovu ella gerast sjálvstøðugur vinnurekandi.

## Tilvirkisatstøði

Endamálið er, at menna vitan og kunnleika innan økið, sum kann stimbra um møguleikan fyri einari nýggjari framleiðsluvinnu innan okkara tilfeingið.

Útbúgvingin er ein 2 ára grundútbúgving, sum tekur støðið í handverkstraditiónum innan tilfar og tóvirki. Ein útbúgving, sum kann birta upp undir skapandi hugin hjá fólki, so tey fáa eina grundvitan um handverk, tilfar og møguleikarnar at framleiða. Fyrst og fremst verður tilfar úr føroyskum náttúrutilfeingið nýtt. Hetta er ein útbúgving, har vit koma inn á framleiðsluhættir at virka ull, skinn og annað.

Eingin upptøka er til tilvirkisatstøði í 2021. Upptøka er aftur í august 2022.

## Matvøruatstøði

Á Tekniska Skúla í Klaksvík er møguleiki at útbúgva seg innan matyrki sum gastronomhjálpari ella føðsluhjálpari.

Útbúgvingin byrjar við grundskeiði á 20 vikur, ið endar við próvtøku.

Eftir lokna próvtøku velur tú, hvørja leið, tú ynskir at fara: gastronomhjálpari ella føðsluhjálpari. Síðan byrjar 2. skúlaskeið, har tú fert í starvsvenjing í 10 vikur og í skúla í 10 vikur, sum endar við einari eftirmeting.

Eftir grundskeið og 2. skúlaskeið hevur tú møguleika at koma í læru innan ta leið, tú hevur valt. Lærutíðin er 36 vikur. Útbúgvingin endar við 2 vikum í skúla, har tú tekur eina endapróvtøku.

Sum gastronomhjálpari hevur tú møguleika at útbúgva teg víðari til gastronom (kokk), og sum føðsluhjálpari hevur tú møguleika at úbúgva teg til føðsluatstøðing.

Ein stórur partur av arbeiðinum hjá einum gastronomi snýr seg um at seta máltíð saman, so at tann vitjandi fær eina góða uppliving. Eisini lærir tú m.a. um matvørugóðsku, kundatænastu, borðreiðing og reinføri.

Sum føðsluatstøðingur arbeiðir tú við at seta saman serkost til fólk við ymiskum sjúkum, eldri, ítóttarfólk, børn og ung. Á skúlanum lærir tú m.a. um føðslu- og kostlæru, heilsu og reinføri.





# Yrkisútbúgvingar innan skrivstovu, handil og tænastur

## Skrivstovuútbúgvingar

Ógvuliga nógvar yrkisútbúgvingar eru at velja ímillum innan skrivstovu og fyrisiting. Skrivstovuútbúgving uttan sergrein kann takast við skúlagongd í Føroyum. Fyri aðrar skrivstovuútbúgvingar er galdandi, at tú ert í læru í Føroyum, men tekur skúlagongdina í Danmark.

Ynskir tú eina skrivstovuútbúgving við sergrein, td. sum advokatskrivari, læknaskrivari ella innan almenna fyrisiting, er skúlagongdin í Danmark.

Ein skrivstovuútbúgving gevur tær grundleggjandi vitan um fyrisiting og búskap. Tú lærir um samband við kundan og tænastu, hvussu tú arbeiðir við tekstviðgerð, dátugrunnum, rokniarki og øðrum kt-skipanum.

Tekur tú eina skrivstovuútbúgving við skúlagongd í Føroyum, tekur útbúgvingin 4 ár. Av hesum er 1 ár FHS (les meira um FHS á s. 13), sum eisini er fyrsta árið av búskaparbreytini á miðnámsskúlunum. Til ber at fara í læru beinleiðis úr 9. flokki og síðan taka FHS fakini ígjøgnum lærutíðina. Tá er skúlagongdin skipað ymiskt á einstøku skúlunum. Vend tær til skúlan, har tú ynskir at ganga, og fá nærri kunning. Samlaða lærutíðin er tó 4 ár.

Eisini ber til at søkja inn á FHS áðrenn 15. mars uttan lærusáttmála, og síðan fara í skrivstovulæru eftir at hava lokið FHS. Tá verður útbúgvingartíðin stytt til 3 ár. Av teimum 3 árunum eru 7 vikur skúlagongd, sum verður tikin ígjøgnum tey 3 árini.

Skrivstovuútbúgvingarnar við skúlagongd í Danmark krevja, at tú tekur eina EUX. Ein EUX er ein útbúgving, ið er samansett av bæði einum studentsprógvi og einum sveinabrævi. Samlaða longdin av einari tílíkari útbúgving er umleið 4 ár, men munurin á einari EUX og einari vanligari yrkisútbúgving er, at tú gongur í skúla størri part av lærutíðini.
Skrivstovuútbúgvingar við sergrein, ið krevja EUX, eru t.d.:

- **Advokatskrivari**

Við sergrein sum advokatskrivari lærir tú um rættarmál, umframt at gera skjøl sum t.d. stevningar og testamenti.

- **Almenn fyrisiting**

Við sergrein innan almenna fyrisiting lærir tú um skjalaføring, arkivering og at skriva brøv. Harumframt lærir tú um málsviðgerð.

- **Grannskoðan**

Hevur tú skrivstovuútbúgving við sergrein innan grannskoðan, lærir tú um tær ymisku roknskaparuppgávurnar og at viðgera roknskapir í ymsum virkjum.

- **Spedition/shipping**

Ein speditørur ella shippingstarvsfólk skipar flutning av farmi og vørum sjóvegis. Arbeiðið snýr seg í høvuðsheitum um at skipa sambandið millum reiðarí ella shippingfyritøku og fyritøkur, ið skulu hava vørur fluttar sjóvegis.

- **Læknaskrivari**

Sum læknaskrivari arbeiðir tú m.a. við at stovna journalir, tæna sjúklingum í móttøkuni og annars hjálpa læknanum við ymiskum praktiskum arbeiði ella at leggja komandi læknavitjanir til rættis. Sum læknaskrivari er umráðandi at vera



skipað/ur, duga at samskifta og vera fyrikomandi.

Ein stórur partur av arbeiðinum er at tosa í telefon við viðskiftafólk og almennar myndugleikar á heilsuøkinum. Sum læknaskrivari kanst tú arbeiða á sjúkrahúsi ella á læknamiðstøðum.

## Handilsútbúgvingar

Nógvar ymiskar yrkisútbúgvingar eru at velja ímillum innan handil og sølu. Til ber at taka útbúgving innan Heilsølu og smásølu við føroyskari skúlagongd. Ynskir tú eina handilsútbúgving við sergrein, td. í einum ítróttarhandli, í einari byggibúð ella sum blómubindari, mást tú taka skúlagongdina í Danmark.

Útbúgvingarlongdin á einari handilsútbúgving við føroyskari skúlagongd er 4 ár, har tú tekur FHS, sum antin kann takast áðrenn lærusáttmáli verður gjørdur, ella sum tú tekur ígjøgnum lærutíðina. Fleiri skúlar bjóða FHS og ymiskt er, hvussu skúlagongdin liggur, um tú tekur FHS ígjøgnum lærutíðina. Vend tær til skúlan, har tú ynskir at ganga, um tú vilt vita nærri.

Afturat FHS skalt tú taka 7 vikur skúlagongd, um tú velur útbúgvingina til Heilsølu og smásølu. Hesar liggja á Glasi og skúlagongdin er skipað við einari viku í senn.

Fleiri lærlingaútbúgvingar eru innan handil og sølu, har tú lærir í Føroyum og síðan fert til Danmarkar í skúla. Útbúgvingarlongdin á einari handilsútbúgving við danskari skúlagongd liggur vanliga um 2 ár og 6 mánaðir. Í hesum útbúgvingunum er FHS ikki kravt, men eitt grundskeið á 20 vikur við ymiskum handilsfakum og síðan fleiri smærri skúlaskeið seinni í útbúgvingini. Set teg í samband við Yrkisdepilin: yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo, ella ring á 306560, um tú umhugsar eina tílíka útbúgving.

## Dømir um lærlingaútbúgvingar innan handil og sølu við skúlagongd í Danmark:

### Útbúgving innan heilsølu

Ein handilsatstøðingur tekur sær vanliga av kundum, roknar prísir, ger tilboð og ordraváttanir. Sum handilsatstøðingur við sergrein í heilsølu arbeiðir tú serliga við sølu av vørum ella tænastum.

Til ber at taka hesa útbúgvingina við einum profili og nógv sløg eru av profilum. Ein profilur kann t.d. verða innanfyri maskinur, ellutir ella træ- og byggitilfar.

### Útbúgving innan smásølu

Er talan um handilsútbúgving innan smásølu, tekur tú tær av sølu og øðrum vanligum uppgávum í handlinum. Undir útbúgvingini fært tú undirvísing í sølu og tænastu, har tú lærir at pakka vørur út, prísa og seta vørur upp á pláss í handlinum, umframt at bíleggja vørur. Tú lærir eisini, hvussu tú setur vørurnar upp og gert tær áhugaverdar, umframt at tú lærir um fíggjarviðurskiftini hjá handlinum.

Til ber at taka hesa útbúgvingina við einum profili og nógv sløg eru av profilum. Ein profilur kann t.d. verða innanfyri bøkur, klæðir, ítrótt og skógvar.

- **Handilsútbúgving**

Tá tú tekur hesa útbúgvingina lærir tú sum oftast hjá einari fyritøku, ið handlar við aðrar fyritøkur. Ein týdningarmikil partur av útbúgvingini er at læra, hvussu víðari søla av vørum og tænastum kann gerast, so at tað gevur fyritøkuni vinning. Tí lærir tú eisini at heinta inn tilboð, samanbera prísir og góðsku, arbeiða við logistikki, umframt at keypa inn vørur í passandi mongdum.
Við hesari útbúgvingini kanst tú arbeiða í fyritøkum, ið arbeiða við at handla ella tú kanst byrja tína egnu handilsfyritøku.

- **Handilsútbúgving innan logistikk**

Ígjøgnum handilsútbúgvingina innan logistikk lærir tú, hvat tað kostar at senda og goyma vørur. Tú lærir eisini at leggja til rættis vøruflutning til nógvar kundar, so tað verður gjørt praktiskt og til gagns fyri kundan.

- **Blómubindari**

Útbúgvingin til blómubindara er ein útbúgivng innan smásølu, við sergrein innan blómubinding. Tú lærir grundleggjandi vitan um vørur, sølu og kundatænastu í einum handli. Tú fært vitan um innkeyp, lagurstýring, hvussu tú innrættar handilin, um kassan og um fíggjarviðurskiftini hjá handlinum.
Við sergrein sum blómubindari lærir tú harumframt at binda blómur og tú lærir at seta saman litir, skap og blómur so tað hóskar til uppgávuna, tú skalt loysa.

### FHS - Yrkisnám innan fyrisiting, handil og skrivstovu

**FHS Yrkisnám er støðisútbúgving fyri fleiri styttri útbúgvingar innan handil, tænastu, skrivstovu og fyrisiting, sum tekur eitt ár. FHS Yrkisnám er sett saman av yrkislærugreinum og almennum lærugreinum. Flest allar lærugreinar á FHS Yrkisnámi enda við lærugreinum á C stigi. Ætlar tú at fara í læru innan fyrisiting, handil ella skrivstovu, við skúlagongd í Føroyum, er FHS Yrkisnám ein partur av læruni, um tú ikki longu hevur tikið FHS. Við FHS prógvi kanst tú eisini sleppa inn á annað ári á búskaparbreyt á miðnámi, um tú hevur røttu samansetingina av lærugreinum.**



# Heilsuhjálpari

## 15 mánaðir

Lær at arbeiða sjálvtøðugt við røkt, umsorgan, heilsufremjan, endurmenning og stuðli til dagligt virksemi. Arbeið við fólki, ið bera brek ella aldursbroytingar, sum búgva á stovni ella heima og í Stuðulstænastuni.

Menn teg persónliga í samstarvi við lærarar, næmingar og búfólk.
Skúli er 2 x 3-4 mánaðir í Suðuroy.

Starvsvenjing er 2 x 3 mánaðir, kring landið.

Nógvar arbeiðroyndir við røkt, kunnu geva frítøku fyri ein starvsvenjingarpart. Tú kann útbúgva teg víðari til heilsurøktara.

Byrjar 2 ferðir árliga.

Umsóknarfreist 1. november og 15. mars.

# Heilsurøktari

## 22 mánaðir

Lær at arbeiða sjálvstøðugt við sjúkrarøkt, umsorgan, heilsufremjan, fyribyrging og endurmenning.

Arbeið á sjúkrahúsi, innanfyri psykiatri, á ellisheimi, heima hjá fólki ella við sjúkraflutningi.

Menn teg persónliga í samstarvinum við lærarar, næmingar og búfólk.
Skúli er 3 x 3 mánaðar í Suðuroy, umframt próvtøkutíðarskeiðið.

Starvsvenjing er 3 x 3 mánaðir kring alt landið.

Gevur førleikar at útbúgva teg víðari til t.d. sjúkrarøktarfrøðing, fysioterapeut, ergoterapeut, ljósmóður ella ambulansastarvsfólk. Fleiri av hesum útbúgvingum í Danmark. Serlig upptøkukrøv kunnu vera til útbúgvingarnar.

Byrjar í mars.

Umsóknarfreist 1. november.



Heilsuskúli Føroya



## Um tú vilt gera mun!

*Í øllum trimum útbúgvingum skiftir tú ímillum skúlagongd í Suðuroy og starvsvenjing kring alt landið.*

*Fjarundirvísing 1-2 dagar um vikuna í skúlapartinum.*

*Stuðul frá Studna í 12 mánaðir.*

*Um tú hevur børn undir 18 ár, eyka stuðul pr. barn.*

Tel. 614210
www.heilsuskulin.fo

# Námsfrøðihjálpari

24 mánaðir

Lær at arbeiða sjálvstøðugt við námsfrøðiligum og umsorganarligum uppgávum.

Arbeið innan dagstovna-, skúla og almannaøkið við mennandi og stimbrandi virksemi, sum styðjar upp undir menningina, trivnaðin og læringina hjá børnum, ungum og vaksnum. Menn teg persónliga í samstarvi við lærarar, næmingar og starvsvenjingina.

Ùtbúgvingin varir í 24 mánaðir og skiftir millum skúla og starvsvenjing. Skúlin er í Suðuroy og starvsvenjingin er kring landið.
Talan er um nýggja útbúgving á Heilsuskúlanum, sum byrjaði í 2020.

Byrjar í august.

Umsóknarfreist 15. mars.




**Yvirlitið vísir útbúgvingargongdina frá fólkaskúla til hægri útbúgvingar, har yrkisútbúgvingarnar (bláa kassin) eru eitt stig á leiðini. Punkteraðu strikurnar gera vart við, at ávísar treytir skulu vera uppfyltar fyri at sleppa víðari á næsta stig ella at fáa góðkent ein part av útbúgvingini í hesum sambandi.**

# Framtíðartryggar yrkisútbúgvingar

Eitt av endamálunum við yrkisútbúgvingarskipan okkara er at skapa møguleikar fyri lívlangari læring. Hetta er týdningarmikið at hava í huga, tá ið tú skalt velja útbúgving.

Allar útbúgvingar mugu í dag stremba eftir at geva møguleikar fyri lívlangari læring, skulu tær standa seg í kappingini um tann útbúgvandi ungdómin, har tú ert ein av mongum.

Eitt týdningarmikið endamál við tínari útbúgving, umframt teir førleikar, hon gevur, er, at útbúgvingin í so stóran mun, sum til ber, kann tryggja tær møguleikarnar at fara undir eina víðari ella hægri útbúgving seinni, um tørvur gerst á tí.

Uttanríkis- og mentamálaráðið 2021